## DAGSINS MEINING

### Samgongan damlar víðari

Samgongan heldur fram, staðfesti Anfinn Kalsberg, løgmaður, mánakvøldið, eftir at Tjóðveldisflokkurin hevði svarað, at hann tekur undir við samgongugrundarlagnum. Men Tjóðveldisflokkurin snúði sær undan spurninginum, um flokkurin tekur undir við skrivingini hjá Torbirni Jacobsen, løgtingsmanni, ella ikki.

Sum væntað varð, og sum Høgni Hoydal, floksformaður, hevur sagt, so tekur flokkurin undir við prinsipiellu støðuni hjá Eytsuroyartingmanninum. Afturímóti tekur flokkurin ikki undir við orðalagnum og skuldsetingunum hjá Torbirni Jacobsen ímóti Anfinni Kalsberg og Jørgeni Niclasen.

Hetta merkir í fyrstu atløgu, at samgongan heldur fram. Hon hevur neyvan funnið rætta áralagið aftur, men hon damlar framvið landið eina tíð afturat.

Viðvíkjandi málinum hjá Anfinni Kalsberg um flytingarnar millum bátar og virkið í Norðdepli, og nær hann hevði lagt málið fyri Fútan, so er tað enn ósvarað.

Løgmaður valdi ta løttu loysnina, og skuldsetti Útvarpið fyri at hava endurgivið hann skeivt. Hann sigur seg ikki hava sagt við útvarpsmannin Helga Jacobsen, at hann hevði lagt málið fyri Fútan, áðrenn tað var fyrnað.

Helgi Jacobsen sigur við Sjónvarpið, at hann hevur endurgivið løgmann rætt. Tað merkir, at pástandur sendur ímóti pástandi. Uttan at vit skulu døma, so er ikki hugsandi, at ein royndur og seriøsur tíðindamaður fer at endurgeva løgmann í einum so eymum máli uttan at hann er fullvísur í, at hann endurgevur rætt.

Líkamikið hvør sannleikin er og ikki, so slepst ikki undan at staðfesta, at trúvirðið hjá løgmanni hevur fingið eitt skot fyri bógvin.

Men tá alt hetta er sagt, so skal leggjast afturat, at hetta málið er frá áttatiárunum, og at tað er løgið, at Torbjørn Jacobsen tekur tað fram ein mánað, eftir at samgongan millum Tjóðveldis- og Fókaflokkin er endurskipað. Hví tók hann ikki henda spurningin og málið hjá Jørgeni Niclasen upp, tá samráðingarnar vóru fyri.

Eykasetningurin hjá Torbirni Jacobsen elvdi til eina politiska kreppu, men tað skal ofta til fyri at reinsa luftina, sum danir siga. Í tí prinsipiella málinum un Fiskavirking og eina møguliga einskiljing, fær Torbjørn Jacobsen fulla undirtøku. Tað ikki henda, at henda vælrikna vinnufyritøkan verður syndrað í fleiri ósamvirkandi eindir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

### Bert eitt íkast til tosið um ølsølurnar kring landið

**Martin Kúrberg**

Tað verður altíð spurt um argument, tá tosað verður um at steingja hesi. Ongantíð eitt argument hví tey skulu vera. Er einasta orsøkin meiri søla og vinningur, so eiga hesi at steingja í morgin. Tann menniskjaligi prísurin er alt ov høgur og kunnu bryggjaríini ikki klára seg við tað, sum verður selt gjøgnum einkarsøluna og tey støð, ið hava skeinkiloyvi, so lat fara.

Sagt verður, at tað eru tey, sum eru veik, sum geva eina skeiva mynd av tí heila.

Til tað er at siga, at hevur man ikki tíð at bíða til einkarsøluna, so hevur man ein stóran trupulleika. Hesi sokallaðu veiku eru borgarar í hesum landi og havi eg aldri møtt einum, ið hevur jublað yvir at vera bundin av rúsdrekka.

Eg burdi vitað, eg var ein av teimum, so lat vera við at seta nøvn sum veik, alkoholikarar ella tílík á hesi menniskju fyri at káva út yvir tykkara beinharða sølupolitikk, ið hevur eittans mál: fleiri pengar í kassan.

### Læntar fjaðrar

**Sofus Olsen**

Í Sosialinum 18. í farna mánað varð endurgivin samrøða við Sofus Poulsen úr Aberdeen. Maðurin var í Føroyum í sambandi við, at hann fór at leggja frá sær sum umboðsmaður, heili sjey ár eftir pensiónsaldurin.

Yvirskriftin til greinina er: SOFUS POULSEN, UMBOÐSMAÐUR, SITIÐ ALT HEIMASTÝRIÐ. Her eru nøkur brot úr greinini. I. Miðvikudagin var móttøka í Tinganesi fyri Sofus Poulsen, umboðsmanni í Aberdeen seinastu 54 árini. II. Føroyska býarmyndin í Aberdeen, Sofus Poulsen, fer 1. juli úr starvinum, hann dúgliga hevur røkt seinastu 54 árini, sum føroyskur umboðsmaður. III. 28. juni 1948 var dagur, tá hann gjørdist Føroyskur umboðsmaður í Aberdeen. Hesi trý brotini saman við yvirskriftini eru heldur enn ikki ósmæðin, tey eru rong tala & eisini eru tey illoyal móti umboðsmanninum Odmar Skarðhamar, sum í 1948 setti S.P. í starv sum hjálparmaður á skrivstovuni í skotska býnum.

Greinin er prýdd við myndum. Á tí einu eru hjúnini úr Aberdeen saman við fýra statistum, fýra núlivandi løgmonnum. Hin fimti hevur helst hildið, at tíðin kundi nýtast til eitthvørt meira positivt enn at upptraðka sum pyntidukka úti í Tinganesi.

Mær er sagt, at umboðsstovan varð sett á stovn tíðliga undir seinna heimsbardaga til hjálpar hjá føroyskum sjómonnum, sum førdu ísfisk til Bretlands, serliga til Aberdeen. Fyrstur at manna skrivstovuna mundi vera Lias Johansen í Rættará. Sambært grein í Sosialinum 1978 loysti Odmark Skarðhamar hann av í 1945 & sat hann sum umboðsmaður Føroya til í 1978, tá hann fór frá vegna aldur. Hann fylti sjeyti. Sum ein lítillátin heiðursmaður fór hann stillisliga úr starvinum, uttan løgmansparadur & annað fjant og fjas.

Tað er reingjan av sannleikanum, tá Sofus Poulsen í oman fyri nevndu grein sigur seg hava verið umboðsmann í 54 ár, tí til 1978 æt hesin Odmar Skarðhamar. Hann hevði ein hjálparmann.

Loksins kann nevnast, at tá ein føroysk nevnd, sum eg var limur av, seinna part í sekstiárunum hevði fundir við bretsku trolaraeigararnar í London, var umboðsmaðurin úr Aberdeen, sum skuldi vera okkum til hjálpar, Odmar Skarðhamar.

### Er búskaparlig imperialisma nýggja leiðin?

**Magnus Brahé Jørgensen**
*magnusj@post.olivant.fo*

Tað tykist hugstoytt, nú fræííttist í kvøld í Útvarpinum, at Niels Winther Poulsen, formaður Framtaksgrunnsins, sigur frá, at Fiskavirking verður selt, sum tað er til hægstbjóðandi, eisini til útlendingar.

Lat søguna læra okkum eitt sindur. Hvussu hevur støðan búskaparliga ikki verið í Suðuramerika og í Afrikansku hjálondunum í øldir? Nei, eg spyrji bara!

Útpínd av útlendskum vinnulívi hava hesi lond verið. Har allur profittur fór og framvegis fer í lummarnar á útlendskum imperialistum, og fólkið í hesum londum fær ikki nakran ágóða av øllum teimum virðum, ið tey skapa og stríðast fyri, hvønn ein dag, júst at tryggja sær og sínum livilig kor í tí dagliga.

So lat okkum avmarka hesa privatisering av Fiskavirking til eina sølu innanlendis og ikki bjóða útlendskum kapitali møguleikan. Lat fólkið í hesum landi eiga vinnutólini. Gev ikki útlendingum enn einaferð møguleikan at eiga og ráða yvir okkum, sum teimum lystir.

Ella skulu vit enn einaferð selja okkum sum trælir, har summi okkara millum eisini fáa ein bita av kakuni?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## UTTAN ÚR HEIMI

# 12 doyðu í ísraelskum rakettálopi



*Palestinar við líkinum av einari kvinnu, sum doyði í ísraelskum álopi í Gaza*

**Málið var at beina fyri einum av teimum ovastu leiðarunum í Hamas, men álopið kostaði ellivu øðrum lívið. Teirra millum vóru fleiri børn. Hamas hevur svorið, at álopið verður hevnt**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Gjáranáttina sendi eitt ísraelskt F16-flogfar eina rakett eftir einum íbúðarhúsi í Gaza býi. Málið hjá ísraelsmonum var at beina fyri Hamas-leiðaranum Salah Shehada, sum hevur skipað fyri fleiri atsóknum at ísraelskum málum, teirra millum fleiri sjálvmorðsatsóknum.

Hamas-leiðarin hevur leingi staðið ovast á ísraelska listanum við nøvnum á palestinskum yvirgangsmonnum.

Talsmenn hjá sjúkrahúsinum søgdu nakað eftir álopið, at kona Hamas-leiðaran og ein dóttur teirra vóru millum tey deyðu, og at sjey onnur børn høvdu latið lív í álopinum. Umleið 150 fólk vóru særd, men hildið varð, at fleiri lógu undir tí sundursoraða íbúðarhúsinum, sum var í seks hæddum.

### ST fordømdi álopið

ST-aðalskrivarin Kofi Annan fordømdi alt fyri eitt álopið.

– Ísrael hevur skyldu til at gera alt fyri at forða fyri, at ósek lata lív. Í hesum førinum veik landið frá sínari skyldu við at leypa á eini íbúðarhús við einari rakett, segði Fred Eckhard, sum er talsmaður hjá ST-aðalskrivaranum.

Hann legði afturat, at ST vil hava Ísrael at gevast við atsóknum sum hesari og at halda altjóða fólkarættin.

Men ein talsmaður hjá ísraelska uttanríkisráðnum vísti atfinningunum hjá Kofi Annan aftur. Gideon Meir segði, at atsóknin var sjálvverja. Hann legði afturat, at ísraelsk børn hava eisini latið lív í palestinskum atsóknum.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, rósti herleiðsluni fyri eina væl útinta atsókn.

Samráðingarleiðarin hjá palestinsku myndugleikunum, Saeb Erekat, segði við BBC, at ísraelska rakettálopið var eitt skammiligt krígsbrotsverk og eitt álvarssamt álop á friðartilgongdina.

### Verður hevnt

Fleiri hundrað Hamas-viðhaldsmenn skipaðu fyri mótmælum í Gaza, tá tíðindini um álopið bórust, og ísraelskir hermenn noyddust at senda stríðsvognar at steðga mótmælunum.

Talsmaðurin hjá Hamas, Abdel Aziz Ramteesi, segði, at Ísrael fer skjótt at kenna sviðan av hevndaratsóknum aftur fyri álopið.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Ísrael hevur beint fyri víðgongdum palestinskum leiðarum við beinleiðis álopi, og higartil hava tílík álop altíð elvt til fleiri palestinskar hevndaratsóknir.

# Evropa er nú mál fyri yvirgangi eins og USA

**Hóast amerikanarar hava bumbað venjingarlegurnar hjá al-Qaeda í sor, er felagsskapurin framvegis líka virkin**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Tað er niðurstøðan hjá amerikanska blaðnum USA Today.

– Felagsskapurin fær framvegis nýggjar limir, og vit vita, at tað finnast limir og viðhaldsfólk hjá al-Qaeda í næstan øllum heimsins londum. Vit vita, at hetta er eisini galdandi fyri alt Evropa, og at bólkarnir javnan samskifta, skrivar USA Today og sigur seg hava tíðindini frá Peter Gridling, sum stendur á odda fyri antiyvirgangsdeildini hjá evropeiska løgreglusamstarvinum Europol.

Sambært Peter Gridling ganga fleiri hundrað yvirgangsmenn leysir, og felagsskapurin hevur eftir sera stuttari tíð megnað at laga seg til tær broyttu umstøðurnar. Umfatandi fregnartænastuarbeiði og eftirlit hevur ikki darvað al-Qaeda stórvegis, og tí er langt eftir á mál, sigur Gridling sambært USA Today.

Leiðarin á altjóða yvirgangsstovninum í París, Roland Jaquard, sigur við blaðið, at í dag má tað haldast at vera líka sannlíkt, at yvirgangsmenn fara at søkja at málum í Evropa sum í USA, sum Evropa er sera virkið í Afghanistan.

– Eg stúri fyri, at vit fara eisini at síggja umfatandi álop í Evropa, sigur Roland Jaquard við USA Today.